## Ein millión í eykajáttan til Kollafjarðar skúla

Á býráðsfundinum í annaðkvøld skal Tórshavnar Býráð taka støðu til, um Kollafjarða skúli skal fáa eina millión krónur í eykajáttan.

Biðið verður um pengarnar til raksturin av skúlanum í 2006 og til fullfíggjan av alis- og evnafrøðisstovuni.

Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at veita eykajáttan uppá kr. 600.000,00.

Kollafjarðar skúli er út- og umbygdur m.a. fyri at kunna hava framhaldsdeild. Í sambandi við hetta varð hædd ikki tikin fyri ymiskum eykaútreiðslum í rakstrinum, sum m. a. stóðust av, at skúlin nú hevur fingið 8. og 9. flokk, og at størri øki er at vaska. Hædd varð heldur ikki tikin fyri løn til vakt í svimjihylinum í sambandi við almenna svimjing. Tilsaman 480.000 kr.

Harumframt hevur skúlin skula etablera eina alis- og evnafrøðistovu. Alis- og evnafrøðistovan er ikki fullfíggjað tá snýr seg um tól og grundtilfar. Fyri at fáa hetta á eitt nøktandi støði tørvar skúlanum 400.000 kr.

Trivnaðarstjórin og mentamáladeildarleiðarin mæla til at veita skúlanum eykajáttan uppá kr. 480.000.

Harafturat verður mælt til at játta skúlanum 400.000 kr. av konto 90 til at fullfíggja alis- og evnafrøðistovuna.

Fíggjarnevndin samtykti fríggjadagin at játta kr. 480.000,00 av reguleringskontoini og at mæla býráðnum til at játta kr. 400.000,00 av íløgum.

# Heðin Mortensen vil parkera sum løgmaður

**Á býráðsfundinum í annaðkvøld skal Tórshavnar Býráð taka støðu til, um Heðin Mortensen, borgarstjóri, skal fáa serrættindi at parkera á Vaglinum. Hann ynskir at sleppa undan tíðaravmarkingini, so hann sleppur frá at seta bilin í garasjuna niðri Tórsgøtu**

PARKERING
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo



*Garasjan her í garðinum á gamla reinsaríðnum hýsir borgarstjórabilinum, sum nú eftir ætlan skal hava loyvi at parkera í gamla Kommunuskúlagarðinum uttan um vanligu tíðaravmarkingina*

Sum grundgeving fyri ynskinum um serloyvi at parkera sigur Heðin Mortensen, at hann má sleppa at seta bilin á parkeringsplássið á Vaglinum, tá bráðneyðugir fundir o. a. stinga seg upp, har tíð ikki er at seta bilin í garasjuna. Garasjan, sum hýsir borgarstjórabilinum, er í Tórsgøtu millum Reinsaríið og Miðlahúsið. Borgarstjórin vísir til avtaluna, sum býráðið hevur við landsstýrið um parkering hjá landsstýrismonnum og løgmanni í Tinganesi. Teir hava fingið eitt frámerki frá fútanum at leggja í bilin, soleiðis at hesir kunnu standa í nærri ávísum básum í óavmarkaða tíð.

Íbúgvar í gomlu Havnini søktu fyri nøkrum árum síðani um at fáa eina serskipan viðvíkjandi parkering, har eisini varð víst til avtaluna við landsstýrið – sum gevur landsstýrismonnum og løgmanni loyvi at parkera í teirra grannalag.

Men tá var svarið frá býráðnum, at eingin skal hava serrættindi at parkera í Havnini.

Umsøkjararnir fingu eisini skrivligt svar frá Tórshavnar Kommunu um, at avtalan við landsstýrið varð uppsøgd.

Men nú er í øllum førum vent í holuni. Landsstýrismenn og løgmaður hava framvegis serrættindi fram um íbúgvarnar at parkera á ávísum básum í Tinganesi – og júst hesa grundgeving hava tekniski stjórin hjá Tórshavnar Kommunu, Jákup Egholm Hansen, og býarverkfrøðingurin, Boði Haraldsson, fyri at ganga ynski borgarstjórans á møti.

# Býráðið tekur ikki borgaran í álvara

**- Tað er eitt paradox, at Tórshavnar Býráð nú skal taka parkeringspláss frá teimum handlandi í miðbýnum, fyri at borgarstjórin skal sleppa frá at ganga í 45 sekund niðan úr garasjuni í Tórsgøtu**

PARKERING
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo



*Tummas Hanus Dam skilir ikki, at borgarstjórin hevur trupulleikar av parkeringini, tá hann einans hevur 45 sekund úr bilinum niðan á skrivstovuna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

- Hatta má vera skemt, hatta ber ikki til. Álvaratos, eg haldi ikki, at borgastjórin tekur borgararnar í álvara.

Tað heldur Tummas Hanus Dam, handilsmaður í miðbýnum í Havn, tá vit spyrja hann, hvat hann heldur um uppkostið hjá Heðini Mortensen, borgarstjóra, um at sleppa undan tíðaravmark á parkeringsplássinum á Vaglinum.

Tummas Hanus Dam heldur ikki, at miðbýurin og handilslívið í miðbýnum hevur nakran góðan í Tórshavnar Býráð.

- Tað er gott, at vit fingu nýggja parkeringsplássið í Jóannesar Patursonargøtu. Tað var tiltrongt, men tað hjálpir kortini ikki upp á støðuna hjá teimum, sum skulu handla í miðbýnum, heldur hjá teimum, sum arbeiða í miðbýnum, heldur hann.

- Tað, sum vit hava brúl fyri er skjótt umsetilig parkeringspláss, har tú kanst standa í 15 minuttir. Eg haldi ikki, at eg fari skeivur um eg sigi, at seinastu 10-15 árini eru ikki skapt fleiri enn eini 10 - 15 slík parkeringspláss í miðbýnum, so tá man nú skal fara at taka burtur av hesum til borgarstjóran, fyri at hann skal sleppa undan at ganga í 45 sekund úr Tórsgøtu niðan á Vaglið, tá haldi eg ikki, at man tekur borgaran í álvara, sigur hann.

Tummas Hanus Dam vísir á, at tey, sum keypa, ofta handla skjótt. Tey vilja parkera beint uttanfyri fyri síðani at loypa inn og keypa tað, sum keypast skal.

- Skalt tú hava eitt smáting í einum handli í miðbýnum, so parkerar tú ikki á Skálatrøð og gongur aftur og fram, tað er bara so, sigur hann.

## Løgið at summi fáa serrættindi

PARKERING
*Eirikur Lindenskov*
eirikur@sosialurin.fo

- Tað er rættiliga undarligt, at summi fólk skulu hava serrættindi at parkera í miðbýnum, tá vit onnur, sum liva av at reka forrætning her, hava so stórar trupulleikar av vantandi parkeringsplássum.

Tað sigur Hans Waag, stjóri í Handilskjallanum í gongugøtuni í Havn.

Hans Waag sigur, at handlarnir í miðbýnum í hesum døgum eru í sambandi við býráðið um parkeringsviðurskiftini. Teir hava fingið lovað, at teir fimm, seks básarnir, sum eru uttan fyri Handilskjallan ikki skulu takast burtur, men nú gøtan verður umvæld, sær tað kortini soleiðis út.

- Vit ynskja einki stríð við býráðið um hetta, men tað tykist løgið, at summi skulu hava serrættindi, tá parkeringsplássini eru so fá, sigur Hans Waag.

Hann sigur, at teir seks básarnir uttan fyri Handilskjallan hava sera stóran týdning fyri teir fýra handlarnar í Handilskjallanum. Har er loyvt at parkera í hálvan tíma, og tað er sera hóskandi, sigur Hans Waag.